HB-KÍ 1-1 (1-1):

# Meistararnir mistu á heimavølli

**Hóast HB hevði hópin av rimmar møguleikum, so mátti eitt kloddamál til, áðrenn stig fekst úr dystinum móti KÍ**

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo



*Tá KÍ í seinna hálvleiki fekk høvdið fyri seg, var tað oftani við einum væl uppløgdum Eyðun Klakstein sum millumstøð, at kontraálop vórðu send niðan móti HB-málinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var ikki nógv fyrstu longu løtuna, sum bendi á, at HB skuldi fáa nakrar stórvegis trupulleikar av KÍ í dystinum sunnudagin.

Fyrsta góða korterið skolaðu álopini oman móti KÍ-málinum, og fleiri góðir møguleikar spurdust eisini burturúr. Størstur mundi tann hjá Jákupi á Borg vera, tá hann fáar metrar úr málinum vísti, hvussu tú kanst lata vera við at skora í opið mál, men ístaðin lyftir bóltin upp um tvørtræið.

HB hevði enntá bóltin í KÍ-málinum, men ta ferðina varð veittrað fyri rangstøðu, og ístaðin var tað løtu seinni KÍ, sum hevði lagt seg á odda.

Ein langur bóltur varð lossaður fram á vøllin, og tá Vagnur Mohr Mortensen og Pól Næs Joensen ikki kundu semjast um, hvør skuldi taka sær av hesum, smeyg Jacob Bymar sær ímillum og stútaði bóltin upp um málverjan og í manntóma málið.

Hetta var sum vátur vøttur hjá HB at fáa, men hóast kjaftfiskin, so hildu teir áfram at trýsta móti vindinum. KÍ fekk kanska spakuliga betri tak á, men tað var framvegis HB, sum stýrdi, og aftur komu teir til møguleikar. Liðskiparin, Rúni Nolsøe, mundi kenna seg sum stórsyndara, tá hann – eftir at hava tacklað seg leysan í fimm-metrinum – langaði bóltin á stongina, men lítla løtu seinni var tað so kortini Rúni, sum kundi flenna harðast.

Rasmus Nolsøe, sum avloysti ein skaddan Janus M. Joensen á vinstra bakki, sendi knallhart innfyri. Rúni royndi at stýra bóltinum, og tá hesin so bar við verjuleikara, varð Jákup Mikkelsen púrasta prísgivin í KÍ-málinum.

### KÍ kundi revsað

Hetta var stutt fyri hálvleik, og tá HB í seinna hálvleiki skuldi hava vindin við sær, mundu fá ivast í, at teir nú aftur fóru at herða trýstið á KÍ-verjuna.

Tað var kanska eisini ætlanin, men tað gjørdist sjáldan veruleiki. KÍ-liðið var munandi betri skipað, nú teir komu út aftur á vøllin, og tó at HB royndi at spæla bæði breitt og djúpt, so megnaðu teir sjáldan at koma til veruligar møguleikar. Einstakar ferðir sluppa Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni ígjøgnum í borðunum, men góðskan á innleggunum var sjáldan nóg góð.

Hinvegin var fleiri ferðir upptrekk til vandastøður framman fyri HB-málið, tá KÍ sendi skjótu mótálopini avstað. Serliga lá væl fyri hjá Eyðuni Klakstein á miðvøllinum at fáa tamarhald á støðuni, áðrenn bóltar vórðu stungnir avstað, og so ráddi um hjá álopsmonnunum at renna seg leysar av HB-verjuni.

Heilt leysir gjørdust teir tó ongantíð, men serliga seinastu løtuna – tá HB flutti nógv fólk fram – kundi tað verðið heilt vandamikið, um neyvleikin í seinastu sendingini var størri.

### Sýndi veikleikar

Skal takast samanum dystin, so var javneikurin kanska eitt rættvíst úrslit, men tað skerst ikki burtur, at HB átti allar fortreytir fyri at fáa fult burturúr. Men tá fyrsta trýstið var farið av teimum, so megnaðu teir ikki í nóg stóran mun at skapa yvirtalsstøðurnar, sum kundu givið avgerandi gjøgnumbrotini.

Við at seta Jan Andreasen og Harley Bertholdsen á back-plássini hevði Ove Flindt Bjerg eisini gjørt sítt fyri at steðga vandamikla vongspælinum hjá HB, og tó at Heðin og Jákup onkra ferðir sluppu avstað, so eydnaðist hesin parturin av taktikkinum. Og á miðvøllinum tóktist KÍ við eini diamant-líknandi uppstilling eisini at byrgja fyri hart arbeiðandi miðvøllinum hjá HB.

Og so hevði tað helst eisini sín týdning, at HB her møtti eini verju, sum megnaði at taka dystin upp við Rógva Jacobsen í luftspælinum. Serstakliga tá hesin ikki hevði leikandi venjaran, sum var úti við skaða, til at hjálpa sær í hesum partinum.

Og tað skerst heldur ikki burtur, at verjuparturin sá nakað jánkasligur út til tíðir. Ikki minst høvdu teir trupulleikar, tá KÍ royndi at kontra niðan eftir. Kanska eisini tí Janus ikki var við hesaferð, men móti liðum við kvikari álopsmonnum enn teimum hjá KÍ kann væl verða, at trupulleikararnir hjá meistarunum verða enn størri.

## FAKTA UM DYSTIN

**HB-KÍ 1-1 (1-1)**
0-1: Jacob Bymar, 17.
1-1: Rúni Nolsøe, 43.
**HB:** Pól N. Joensen – Hallur Danielsen, Vagnur M. Mortensen, Símun Eliasen, Rasmus Nolsøe (Eli Thorsteinsson, 77.) – Jákup á Borg, Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, Heðin á Lakjuni – Rógvi Jacobsen (Hendrik Rubeksen, 63.), Rókur á Fløtum Jespersen
**Gult kort:** Kári Nielsen, 63., Rúni Nolsøe, 86.
**KÍ:** Jákup Mikkelsen – Jan Andreasen, Niclas Niclasen, Ove Nysted, Harley Bertholdsen – Eyðun Klakstein, Jan Joensen, Atli Danielsen, Símun Joensen (Fríðin Ziskason, 90.) – Leon Bjartalíð (Erling Fles, 74.), Jacob Bymar
**Gult kort:** Ove Nysted, 36., Atli Danielsen, 74., Niclas Niclasen, 79.
**Dómari:** Suni Johansen: Kom sum so væl frá uppgávuni, men er tíverri ikki einasti føroyskin dómarin, sum alt ov ofta letur menn sleppa bíliga avstað við ljótum eftirtacklingum.

# Nøgdir um javnleikin



Hóast KÍ kanska ikki kann nýta eitt einstakt stig til so øgiliga nógv í verandi støðu, so tóktist fyrrverandi liðskiparin og venjarin hjá liðnum, Jan Joensen, sum í ár tó bert er vanligur leikari, tó at vera væl nøgdur.

– Sum HB hevur koyrt í seinastuni, so fái eg illa sagt annað enn, at vit eru nøgdir. Sjálvandi høvdu vit tørv á trimum stigum, um hugt verður at stigatalvuni, men tað var ikki í hesum dystinum, at vit skuldu rættað upp á áður framd mistøk. Mistøkini eru, at vit hava mist alt ov nógv á heimavølli, og tað hevur so verið rættiliga dýrt higartil.

Um dystin helt Jan annars sjálvur, at bæði hann og liðfelagarnir kundu vera nøgdir um tað, sum teir høvdu sýnt.

– Sjálvandi eru vit øgiliga trýstir í fyrra hálvleiki. Serliga fyrstu løtuna hava teir møguleikar til fleiri mál, men tá vit so fáa skorað, so lætnar tað eitt sindur.

– Tað eru tó framvegis teir, sum hava trýstið, og teir fáa eisini eitt keðiligt mál, tá Jákup verður snýttur av einum avrættaðum stútara, men í seinna hálvleiki koma vit ordiliga fyri okkum. Tá standa vit rætt á vøllinum, so teir ikki fáa sama trýst á, og sjálvur haldi eg, at vit eins vøl kundu lagt okkum á odda, sum teir.

– Alt í alt, so eri eg tó væl nøgdur. Sum sagt, so var tað ikki í hesm dystinum, at vit skulu bøta um gomul mistøk, og hjá einum liði, sum hevur leikt javnt á heimavølli móti GÍ og EB/Streymi, so man 1-1 í Gundadali móti HB ikki vera ta ringasta, helt Jan Joensen at enda.

**-jm**

# Kortsluttar eftir ein tíma

**Gøtumenn spyrja seg sjálvar, hvat tað er, sum hevur við sær, at tað ferð eftir ferð koppar ímóti teimum, tá ið ein hálvur tími er eftir**

GÍ SPURNARTEKIN
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo



Teir spyrja seg sjálvar og hvønn annan, hvør orsøkin man vera, og eingin situr við svarinum. Men tað er ein veruleiki, at í flestu av teimum sjey landskappingardystunum, sum higartil eru spældir, hevur tað roynst væl hjá GÍ fyrsta tíman, men so hevur tað gingið av skriðuni.

Teir siga, at tólv av málunum, sum eru farin ígjøgnum hjá teimum, eru skoraði í síðsta hálva tímanum.

– Jú, soleiðis er tað. Vit spyrja okkum sjálvar, hvat tað er, sum hevur kiksað, men vit hava ikki nakað beinleiðis svar uppá hetta. Ímóti Skála gekk alt fyrsta tíman akkurát, sum vit høvdu ætlað og vónað. Vit vistu, at teir fóru at verða ágangandi, og vit høvdu avrátt, at tað skuldi vera tætt millum keturnar hjá okkum, og at vit skuldu dúva uppá deyðbóltsstøður og so kanska, at Popczynski skuldi fáa okkurt burturúr sjálvur. Tíverri høvdu vit ikki hepni við okkum, tá ið tað í 1. hálvleiki, staðfestir miðvallarin og einsamalli landsliðsspælarin hjá GÍ, Súni Olsen.

Hann vísir eisini á, at tá ið tað fyrstu ferð var komið hol á, gekk alt skeiva vegin.

– Teir eru skjótir, og tí kann tað sjálvandi koma fyri, at teir eru leysir mitt fyri málinum hjá okkum. Men tað er undarligt, at teir knappliga fara at vinna luftbóltarnar, tá ið vit so leingi hava hildið teimum so væl. Hetta er nakað, sum vit mugu arbeiða við, nú vit fyrireika okkum til HB vitjanina, heldur Súni Olsen.



Skála-GÍ 4-0 (0-0):

# Jónhard nýtti trettan minuttir til hattrikk

**Annar landsliðsmaðurin hjá Skála noyddist at taka seg burturúr, og hin gjørdi trý mál eftir lítlum korteri, tá ið oddaliðið rættuliga setti GÍ upp á pláss**

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo



*Fótbóltsfagnaðurin á Skála stendur við. Hesaferð varð GÍ sent til hús við einum ordans sekki*

Fótbóltsgleimurin á Skála stendur við. Hesa ferð stóð GÍ fyri tørni, og teir vórðu sendir um aftur Gøtueið við 4-0 tapi í viðførinum.

Leingi bendi lítið á, at munurin skuldi fara at gerast so stórur. Gøtumenn vóru komnir á Skála at verja um tað, sum teir høvdu við sær, og tað eydnaðist væl fyrsta tíman. Tað var tætt millum keturnar, og tað gekk ikki væl hjá Skála at spæla seg til stórar møguleikar undan fitta lotinum. Samanspælið var ikki nóg neyvt til, at tað skuldi eydnast.

Jónhard Frederiksberg hevði ein stútara í tvørtræið í 1. hálvleiki, og í hinum endanum var tað um reppið, at eitt av ógvuliga vandamiklu fríspørkunum hjá Súna Olsen endaði í málinum. Men bólturin brast í tvørliggjaran.

Hjá Skála kom tað illa við, at liðformaðurin og nýklækti landsliðsspælarin, Pauli G. Hansen, noyddist at taka seg burturúr, tá ið ein lítil hálvur tími var farin. Í vikuni varð hann raktur av lítlum vøddaskaða, og tað var skjótt sunnudagin, at tað varð staðfest, at skaðin kortini ikki var so mikið álvarsligur, at tað ikki bar til at halda fram, og so kom Rúni Rasmussen á miðvøllin.

### Umskipaðu

Hóast GÍ hevði vindin undan eftir steðgin, so tóktist tað ikki sum um, at teir ætlaðu at leggja heimaliðið undir trýst. Heldur royndu teir at halda fram við tí, sum teir í fyrra umfarinum høvdu havt so góða eydnu við.

Skála umskipaði eitt sindur eftir steðgin. Tað gjørdu teir fyri at fáa størri breidd og tyngd í uppspælið. Hanus Thorleifsson, sum hevði verið ytsti miðvallarin í høgru í 4-4-2 spælskipan, varð fluttur at vera meiri sentralur, har hann og Rúni Rasmussen og Nenad fyltu meiri. Jónhard Frederiksberg var einsamallur heilt frammi í toppinum, og so vóru Bogi Gregersen og Alexandur Johansen meiri vongspælarar í ávikavíst høgru og vinstru.

### Trý mál í trettan minuttir

Eitt korter var farið av 2. hálvleiki, tá ið Skála fekk hol á, og so gekk tað heilt skjótt. Jónhard Frederiksberg var meistari fyri trimum teimum fyrstu málunum. Harvið gjørdi hann reint hattrikk, sum teir plaga at siga.

Í 61. minutti stútaði hann horna úr høgru frá Iulian Florescu í málið, og sjey minuttir seinni var hann fyrstur á nýggjum innleggi frá Iuliani. Gleði og gleimur í Skála leguni, men Jónhard var ikki liðugur. Í 74. minutti endaði Skála uppspæl og nógvar skjótar og hugflogsríkar flytingar, sum lótu gøtumenn eftir uttan møguleika at byrgja fyri, við, at Jónhard Frederiksberg enn eina ferð skoraði.

Løtu seinni varð trífaldi málskjúttin fagnaður, tá ið hann fór av vøllinum. Í staðin kom Stancovic á vøllin, og hann takkaði fyri álitið. Eftir fínt uppspæl og sundurtaging av gøtumonnum, sum síðstu løtuna vóru statistar í Skála sjónleikinum, spældi hann framvið Halli Hansen, ið hevði kent seg noyddan at leypa út, og út í høgra borð, har Bogi Gregersen var púra blankur og uttan nakað sum helst kundi seta bóltin í tóma málið. 4-0 og Skála hevði neglt oddasessin so rimmar fastan.

### Luftin fór úr

Gøtumenn vórðu flongdir, og tað mundi kennast rættuliga snópisligt. Teir høvdu fyrsta tíman hildið seg til tað, sum teir høvdu avrátt, og tað hevði gingið væl. Marginalirnir vóru ikki við, tá ið Súni Olsen sendi fríspark langt úti frá og á tvørtræið. Um tann royndin hevði endað við máli, so høvdu fyritreytirnar verið uppaftur betri fyri avráddu skipingini av spælinum, og so høvdu vánirnar verið uppaftur betri fyri skilagóðum avriki og góðari úrtøku.

Nú skrædnaði ballónin fullkomuliga. Rappfótaðu skálamenninir vunnu ferð eftir ferð tvídystirnar undir málinum við stóru miðverjarnar hjá GÍ - eisini í luftspælinum. Tað bar frustratiónir við sær. Í síðsta minutti sá Atli Gregersen gult fyri aðru ferð. Harvið sektaði hann seg sjálvan og sítt lið longu undan, at HB kemur á vitjan í Gøtu næsta sunnudag.

Tríggjar minuttir undan fyrsta Skála málinum varð Vitus Kofoed settur á vøllin. Hann loysti Poul Arna Jacobsen av. Tað gjørdi ongan mun tann betra vegin, og tað man ivaleyst vera ein stórur spurningur, hvussu ofta maðurin, sum skuldi hjálpa Popczynski í fremstu røð, fer at fáa møguleikan afturat.

# Jóhan var ikki heilt nøgdur



**Skála venjarin rósar sínum monnum fyri stóra úrtøku, men hann heldur ikki, at teir tríggjar tær seinastu ferðirnar hava spælt nóg væl**

SKÁLA VENJARIN
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Sjálvandi hevur Skála venjarin, Johan Nielsen, einki at siga til úrtøkuna, sum hansara lið hevur fingið buturúr sjey teimum fyrstu umførunum. Alt annað hevði verið fullkomuliga burturvið. Skála hevur vunnið fýra heimadystir, og á útivølli hava teir vunnið eina ferð 4-0 og tvær ferðir spælt javnt. Eingin hevði undan kappingarbyrjan ímyndað sær, at Skála skuldi liggja so væl fyri, tá ið juni mánaði var hálvrunnin.

Men tá ið vit tosa við Johan Nielsen, so sigur hann seg ikki vera heilt nøgdan við framrættaða partin fleiri tær seinastu ferðirnar.

– Hetta er nakað, sum vit hava tosað um, og sum vit undir venjing arbeiða við at bøta um. Ímóti B36 á heimavølli vunnu vit 2-0. Eg haldi, at sigurin var fult uppiborin, men vit spældu ikki so væl, sum eg veit, at vit eiga at megna. Tað gjørdu vit heldur ikki í Klaksvík, og serliga í 2. hálvleiki gekk tað ikki væl. Ímóti GÍ hava spælararnir sjálvsálitið, sum skal til, men talan er um ov nógv mistøk, og tey hava við sær, at tað kemur ikki tað flogið og skjótleikin í spælið, sum skal til, um tað skal eydnast at koma til baklinjuna og til møguleikar, tá ið teir eru so kompaktir, sum gøtumenn leingi vóru á Skála, sigur Johan Nielsen.

Skálavenjarin rósar sínum monnum fyri, at teir megna verjuspælið væl, og hann heldur eisini, at tað kann ikki sigast annað, enn at úrtøkan var stór burturúr teimum møguleikunum, sum liðið hjá honum spældi seg til.

– Tað er flott av teimum at skora fýra mál. Um Jónhard var heppin, so fekk hann okkurt afturat, men eg kann ikki annað enn vera nøgdur við úrslitið.

Á dómaraseðlinum er Rúni Rasmussen skrásettur fyri 2-0 málið. Á Skála gjørdu teir dómaran varðugan við, at hetta var ikki rætt, men hann vildi ikki broyta skrásetingina.

– Tað er sum so líka mikið, hvør er skrásettur fyri málini. Hjá okkum er tað hugaligt, at tað gongst so væl, og at vit fáa so mong mál. Men hjá mær var eingin ivi um, at bólturin var innanfyri, tá ið eg royndi móti málinum. Rúni syrgdi síðani fyri, at eingin ivi var hjá nøkrum øðrum, sigur ein sera væl nøgdur Jónhard Frederiksberg, sum vit sjálvandi skráseta fyri øll málini, sum hann skoraði.

**jh**

## FAKTA UM DYSTIN

**Skála-GÍ 4-0 (0-0)**
1-0: Jónhard Frederiksberg 61.
2-0: Jónhard Frederiksberg 68.
3-0: Jónhard Frederiksberg 74.
4-0: Bogi Gregersen 87.
**Dómari:** Petur Skarðenni
**Skála:** Igor Kostic – Bárður Danielsen, Arnhold Berg, Dusan Jaic, Iulian Florescu (Ronni Hansen, 77.) – Hanus Thorleifsson, Nenad, Pauli G. Hansen (Rúni Rasmussen, 28.), Alexandur Johansen – Bogi Gregersen, Jónhard Frederiksberg (Eugen Stancic, 79.)
**Gult kort:** eingin
**GÍ:** Hallur Hansen – Leivur Hansen, Poul Ennigarð, Atli Gregersen, Poul Henning Jacobsen (Hanus Jacobsen, 71.) – Poul Andreas Jacobsen, Símun Louis Jacobsen, Súni Olsen, Magnus Skoralíð (Jónreid Dalheim, 77.) – Krzystof Popczynski, Poul Arni Jacobsen (Vitus Kofoed, 57.)
**Gult kort:** Magnus Skoralíð
**Reytt kort:** Atli Gregersen 90. (tvey gul)